tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 8 |
| --- | --- |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Møtt:**

- Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Alvi Mortensen, Pauli Einarsson, Annika Pearce.

**Varalimir:**

- Annika Pearce møtti fyri Boga Johannesen
- Pauli Einarsson møtti fyri Bjarna Hammer

**Ikki møtt:**

- Bjarna Hammer, Boga Johannesen

**Skrivari:**

- Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
| --- | --- | --- |
| 1 | Býráðslimur fráboða fráveru | 3 |
| 2 | Samanbering av skattainntøkum -jan. - apríl 2020 | 3 |
| 3 | Tilmælið um nýgggja dagfesting av býráðsfundi í juni 2020 | 4 |
| 4 | Teldur til Tvøroyrar Skúla | 5 |
| 5 | Hvalbiar kommuna -fráboðan um felagstilbúgving og tørv á átaksbili | 8 |
| 6 | Barnaansingin í summafrí | 9 |
| 7 | Hagtøl Mýrifýpan -vika8_ 2020 | 10 |
| 8 | Mýrifípan -starvslýsingar | 10 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |


| | | |
|---|---|---|
| 9 | Ung í arbeiði 2020 | 11 |
| 10 | SALT | 12 |
| 11 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul 2020 | 14 |
| 12 | RFF -Fundarfrøsøgn frá aðalfundinum 30. apríl 2020 | 16 |
| 13 | SEV -Fundarfrágreiðingin frá ársaðalfundinum 24. apríl 2020 | 16 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.22.02-A00-1-20**

## 1. Býráðslimur fráboða fráveru

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 27.05.2020**

- Bogi Johannesen, býráðslimur fyri javnarflokkin, hevur boðað frá, at hann hevur lógligt forfall til býráðsfundin 27. mai 2020, og at hann ynskir, at fyrstvaldi eykalimur á listanum Annika Pearce fær loyvi at taka sæti fyri seg.
- Bjarni Hammer, býráðslimur fyri javnarflokkin, hevur boðað frá, at hann hevur lógligt forfall til býráðsfundin 27. mai 2020, og at hann ynskir, at næstvaldi eykalimur á listanum Pauli Einarsson fær loyvi at taka sæti fyri seg.

Vísandi til § 18 stk. 1, 1. punktum í kommunustýrislógini verður tilmælt at:

- Anniku Pearce tekur sæti fyri Boga Johannesen.
- Pauli Einarsson tekur sæti fyri Bjarna Hammer

### Avgerð

Einmælt samtykt at Anniku Pearce tekur sæti fyri Boga Johannesen og Pauli Einarsson tekur sæti fyri Bjarna Hammer

**00.34.00-1-20**

## 2. Samanbering av skattainntøkum -jan. - apríl 2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 18. mai 2020.**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Samanbering av skattainntøkum mnd. jan-apríl 2020/2019

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 1:**
Málið var umrøtt og kunna

### Avgerð

Málið var umrøtt og kunna.

**00.01.00-P35-1-20**

## 3. Tilmælið um nýgggja dagfesting av býráðsfundi í juni 2020

### Málsfrágreiðing

Býráðsfundur er vanliga eina ferð um mánaðin, -seinasta onsdag í hvørjum mánaði-.

Allir býráðsfundir vera hildnir á Kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, í býráðssalinum kl. 19.00.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu fundirnar heldur býráðið eisini av og á eykafundir, tá ið støða skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund.

Í juli og august heldur býráðið summarfrí.

**<u>Býrásfundir 2020 vera:</u>**

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

| JANUAR | FEBRUAR | MARS | APRÍL | MAI | JUNI |
|---|---|---|---|---|---|
| 29 | 26 | 25 | 29 | 27 | 23 |

| JULI | AUGUST | SEPTEMBER | OKTOBER | NOVEMBER | DESEMBER |
|---|---|---|---|---|---|
| - | 28 | 30 | 28 | 30 | 16 |

**Býráðið, 11. december 2019, pkt. 2:**
Einmælt samtykt at halda býráðsfundir í ár 2020 samb. tilmælinum hjá kommunustjóranum.

•

**Kommunustjórin 25.05.2020**
Tilmælið um at broyta tíðaráseting fyri býráðsfundin, ið er samtyktur at vera Týsdagin 23. juni til ístaðin at vera Ónsdagin 17. juni, og at fíggjarnevndarfundurin, ið er samtyktur at vera 17. juni verður Mánadagin 15. juni. 2020

### Avgerð

Einmælt samtykt at býráðsfundurin verður fluttur til 17. juni. og at fíggjarnevndarfundurin verður fluttur til 15. juni.

**17.35.00-Ø40-1-20**

## 4. Teldur til Tvøroyrar Skúla

### Málsfrágreiðing

**Umsókn frá skúlastjóranum dagft. 07.05.2020, um játtan til keyp av teldum til Tvøroyrar Skúla.**

Til Tvøroyrar Kommunu

Nú er tíðin komin at taka næsta stig á telduøkinum.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Útbúnaðurin vit hava í dag er settur saman soleiðis, - um vit fara aftur til 2009 so fingu vit teldur til teldustovuna, 18 fastar teldur. Í 2012 eitt sett av teldum, sum bert blivu brúktar til próvtøkurna og activ inspire talvur og nec uppvørpur til hesar í allar skúlastovurnar . Í 2014 fingu vit 24 teldur við 2 telduvognum, sum standa fast í Trongisvági. Í 2015 keyptu vit 4 stationærar teldur til skúlahúsið. Hartil hava vit í 2016 keypt 6 teldur, sum primært vera nýttar av førleikastovuni. Samanumtikið kann ein siga, at KT-útbúnaðurin hjá Tvøroyrar skúla er rættuliga gamal, og tí, í summum førum so at siga óbrúkiligur.

**Tað eru fleiri orsøkir til, at vit søkja um játtan.**

- Gongdin hevur lagað tað so, at tær teldurnar, sum blivu brúktar til próvtøkur, nú standa úti í skúlastovunum, til næmingar, sum nýta cd-orð, og í skúlahúsinum. Nakrar fáar teldur eru eftir at nýta til verkætlanir og annað. T.v.s. vit hava ongar teldur til "vanliga undirvísing".
- Tá vit hava próvtøkur, hava vit tað soleiðis, at næmingarnir í mest møguligan mun taka sína egna teldu við. Hendan støðan er ikki nøktandi, tí fleiri og fleiri næmingar helst vilja hava teldu frá skúlanum, tí hendan lýkur alt tey skulu brúka til próvtøkuna. Henda gongdin ger at vit ikki hava teldur at lata øllum næmingunum sum ynskja tað.
- Til landsroyndirnar er 4. flokkur í Trongisvági og brúkar teldurnar í telduvogninum. 6 flokkur sum er 26 næmingar situr partvíst í teldustovuni og ein partur í fundarhølinum.
- Tíðin er farin frá teldustovum. Vit ætla tí at avtaka teldustovuna, sum so verður brúkt sum vanlig skúlastova.
- Teldur og teldlar verða nýttir meira og meira í tí dagligu undirvísingini. Tá er tað sera hent at lærarar og næmingar hava atgongd til teldur.
- Um vit hyggja eftir árstølunum so síggja vit, at vit nú flyta okkum frá at hava hoskandi teldur og amboð, til at vera eftirbátur á hesum øki.
- Nú koronasmittan kom á okkum, og allir næmingar skúlans vóru sendir heim, stóðu vit brádliga við einum alstórum trupulleika. Heilt nógvir næmingar manglaðu teldur og kundu tí ikki taka ímóti fjarundirvísing. Allar tøkar teldur í skúlanum blivu lántar út, og eru í løtuni heima hjá næmingum.

Vit hava tosað við aðrar skúlar, og er tað ymiskt, hvussu teir loysa KT-spurningin. Summir geva næmingunum ein teldil í part, meðan aðrir hava farteldur á skúlanum í minsta lagi 80 (Fuglafjarðar skúli).

Ætlan skúlans er at keypa 60 nýggjar farteldur, tí so meta vit, at vit nøkta tørvin her og nú.

Skúlin hevur ikki havt eina langtíðarætlan á KT-økinum, hetta halda vit er umráðandi, so íløgurnar kunnu strekkjast yvir fleiri ár.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Vit hava fingið tilboð frá Nema, Formula og Aktiv. (sí viðheftu skjøl).

**Kommunustjórin 07.05.2020**
Tvøroyrar Skúli hevur arbeitt við einari ætlan um at útskifta gomlu teldurnar, og ístaðin keypa nýggjar tíðarhóskandi teldur til næmingarnar. Hetta er blivið meira átrokandi og aktuelt, nú Korona kreppan hevur viðført, at neyðugt hevur verði við fjarundirvísing.

Ætlan skúlans er at keypa 60 nýggjar farteldur, fyri at nøkta tørvin her og nú. Tvøroyrar Skúli hevur vent seg til aðrar skúlar fyri at hoyra um teirra royndir, og skúlin hevur móttikið tilboð frá 3 veitarum.

Teldur eru eitt týðandi arbeiðsamboð í nútíðarsamfelagnum og er eisini vorðin eitt týðandi amboð í fólkaskúlanum. Fyri at tryggja, at allir næmingar hava tíðarhóskandi skúla amboð, sum eru javnt góð, verður mælt til, at skúlin á hvørjum ári keypir teldur, svarandi til talið av einum nýggjum árgangi av næmingum, soleiðis at málið er, at allir næmingar frá 4. til 10. flokk hava egna teldu.

Mælt verður til, at næmingarnir gjalda eitt depositum fyri teldurnar, sum næmingarnir fáa aftur, tá teldan verður latin inn aftur.

Krav til teldukeyp á hesum sinnið er:

HP Elitebook 840G3
14" Full HD skærm 1920x1080
Intel Core i5-6200 SkyLake
8GB RAM
256GB SSD
USB-C, USB 3.0, DisplayPort, Dock connection
Vægt kun 1,54 kilo og 17,8mm tynd
Windows 10 Pro
2 års garanti.

Neyðugt er við eykajáttan, tá peningur ikki er avsettur til hetta á fíggjarætlanini fyri árið 2020.

**Mentanarnevndin, 11. maj 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Aktiv uppá 40. stk. teldur fyri kr. 149.920,- ex.mvg. Málið verður beint í Fíggjarnevndina. Umsitingin heitur á leiðsluna í Tvøroyrar Skúla um at innlata

uppskot til teldur/útbúnað til FÆ2021, og gera eina langtíðarætlan á KT økinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 10:**
Einmælt samtykt, at fylgja tilmælið frá Mentanarnevndini og taka av tilboðnum frá Aktiv uppá 40. stk. teldur fyri kr. 149.920,- ex.mvg. Fíggingin verður veitt við eykajáttan.

### Avgerð

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini, at játtanin verður veitt við eykajáttan.

**00.01.10-A00-2-17**

## 5. Hvalbiar kommuna -fráboðan um felagstilbúgving og tørv á átaksbili

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 15.05.2020**
Kunna verður um, at Hvalbiar kommuna hevur samtykt at tilbúgvingarsamstarvið millum Tvøroyrar- og Hvalbiar Kommunu verður víðkað til eisini at umfata Fámjins kommunu. Mælt verður til, at málið verður beint í Tilbúgvingarnevndina til kunning og at viðgerða skrivi frá Hvalbiar kommunu viðv. Átaksbili og Sløkkilisstøð.

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 9:**
Málið var umrøtt og kunna, einmælt samtykt beina málið í Tilbúgvingarnevndina til kunning og at viðgerða skrivi frá Hvalbiar kommunu viðv. Átaksbili og Sløkkilisstøð.

### Avgerð

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini og beina málið um nýggjan átaksbil til Hvalbiar kommunu verður tikið upp í tilbúgvingarnevndini.

**28.09.00-Ø00-1-20**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## 6. Barnaansingin í summafrí

### Málsfrágreiðing

**Mýrifípan, dagstovnaleiðarin 05.05.2020**
Seinastu árini hevur stovnurin havt stongt í 2 vikur um summari, 1 viku áðrenn og 1 viku aftaná ólavsøku, men tá hava foreldur havt møguleika at fáa børnini ansaði í dagrøktini. Seinasta summar vóru tað 5 børn ið skrivaðu seg upp til ansing, hesar báar vikurnar, 2-3 møttu. Nú er ongin dagrøkt, men eg mæli til at stovnurin hevur stongt í viku 31 og 32, tí tørvurin á ansing er sera lítil tá. Hesar báðar vikurnar er møguleiki at gera høvuðsreint, og MTV kann gera seg lidnan inni v.v brandteppunum.

**11. maj 2020, pkt. 1:**
**Kommunustjórin 05.05.2020.**
Mælt verður til, -sum eina roynd í inniverandi ári nú ongin dagrøkt er-, at hava barnagarðin og frítíðarskúlan opnan komandi summar. Stovnsleiðarin ger eina kanning hvat tørvurin er á ansing í summartíð, og avgerðin at hava opið verður síðani endurskoða komandi ár, alt eftir tørvinum at hava opið.

Árini frammanundan hevur barnagarðurin verði stongdur í 2 vikur (viku 31&32), serliga fyri at tryggja at børn halda summarfrí saman við teirra foreldrum, har tilmælið er, at øll børn í minstalagi halda samanhangandi 3 vikur summarfrí. Umframt gevur hetta møguleika fyri høvuðsreingerðing, og at fremja serligt viðlíkahald av stovninum, sum kann vera trupult at avgreiða, tá børn er til staðar.

**Sosiala nevnd, 11. maj 2020, pkt. 1:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið frá umsitingina at hava opið í barnagarðinum, sum eina roynd í summar 2020

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 7:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið frá sosialunevnd at hava opið í barnagarðinum, sum eina roynd í summar 2020.

### Avgerð



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið frá Fíggjarnevndini at hava opið í barnagarðinum, sum eina roynd í summar 2020.

**28.00.00-P05-1-20**

## 7. Hagtøl Mýrifýpan -vika8_ 2020

### Avgerð

Málið var umrøtt og kunna.

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 07.05.2020**
Kunning um hagtøl fyri ansingina í Mýrifípuni viku 8 ár 2020

**Sosiala nevnd, 11. maj 2020, pkt. 4:**
Kunna

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 6:**
Malið var kunna og umrøtt.

**81.02.00-3-20**

## 8. Mýrifípan -starvslýsingar

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 26.05.2020**
Barnagarðurin Mýrifípan tørvar starvsfólk.

- 2 størv eru í frítíðarskúlanum - 1 starv er fyri námsfrøðing í farloyvið, og 1 starv er fyri hjálparfólk, í tíðaravmarkaðum starvið.
- 3 størv eru í barnagarðinum, 1 starv er fyri starvsfólk í gevst fyri aldur, 1 starv er fyri, námsfrøðing í er farin úr starvi, og 1 starv er fyri námsfrøðing, sum ferð í barnsburðarfarloyvi

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Tilmælið til setnarbólkurin er:

- Kari Petersen, Leiðari
- Joan Eidesgaard, álitisfólk
- Bára Støm, Námsfrøðingur

**Avgerð**

Málið var umrøtt og kunna

**15.20.00-G01-1-20**

## 9. Ung í arbeiði 2020

**Málsfrágreiðing**

**Kommunustjórin 18.05.2020**
Mælt verður til at Tvøroyrar kommuna aftur í ár 2020 bjoðar ungum arbeiði í teirra summarfrítíð, sum byrjar fríggjadagin 19. juni og endar sunnudagin 15. august. Mælt verður til, at halda fram at lata tilboðið vera galdandi fyri skúlaungdómar í Tvøroyrar Kommunu, og hvør umsøkjari fær í mesta lagi arbeiði í tvær vikur.

**Arbeiði fer fram samb. "Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017"**

./. § 49. [1)] Børn, sum ikki eru fylt 15 ár, kunnu ikki vera sett í arbeiði, sbr. tó stk. 8-9.
./. Stk. 2. [1)] Tá ið ung undir 18 ár verða sett í arbeiði, skal tað í sambandi við skipan og útinnan av arbeiðinum takast atlit til aldur, menning og heilsustøðu hjá tí unga, og at tann ungi hevur møguleika at røkja sína skúlagongd.

Arbeiðið hjá Tvøroyrar kommunu er ætlað fyri ung í bólkinum 15-16 ár.
Hettar merkir, at fyri at tú kanst luttaka í Ung í arbeiði, skalt tú:

- verða fylt/ur 15 ár, áðrenn tú meldar teg til, tó
- ikki fylla 17 ár í tí árinum, tú meldar teg til
- verða sinnað/ur og tøk/ur at arbeiða í tvær vikur í tínari summafríð.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt, at bjóða ungum í arbeiði hjá Tvøroyrar kommunu til tíðaravmarkað verkætlanararbeiði, og at Tekniskadeild samskipar hetta.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið frá fíggjarnevndini og bjóða ungum í arbeiði samb. arbeiðsætlan 2020.

**20.13.00-I00-1-16**

## 10. SALT

**Málsfrágreiðing**

Nevndin mælir til at heita á Saltsilogrunnin um at víðka stýrið til 5 limir, harav kommunan og Fíggjarmálaráðið hava hvør sín fasta lim og skiftast um at velja ein lim, vísandi til samskiftið við Saltsilogrunnin um hetta á fundi hin 20.12.2017.

**Kommunustjórin 6 mars. 2020**
Avtala er gjørd við nevndarlimin Desiree Mortensen, sum er vald av TVK sum umboð í Saltsilogrunnin, at møta til fundin fyri at greiða frá um arbeiði í nevndini, og annars viðurskiftir kring tiltøk í SALT.

**Mentanarnevndin, 9. marts 2020, pkt. 12:**
-Forkv. í mentanarnevndini spurgdi til ynskið og samtyktin, ið var gjørd á mentanarnevndarfundi 4. feb. 2019, um at viðkað nevndina frá 3 limum til 5 limur var viðgjørt í nevndini fyri Saltsilogrunnin. Desiree upplýsti at henda áheitan var ikki viðgjørd.
-Desiree kunnar um, at avtala er gjørd við Janet Joensen hevur Café´ina opna hvønn dag -april til okt.- evt. 11.00-18.00, og har eisini er hugsa um at hava smærri tiltøk um kvøldarnar.
Mentanarnevndin samtykir -enn einaferð- at heita á nevndini í saltsilogrunninum, um at kanna um viðkan av nevndini við 2 limum, soleiðis at henda verður 5 limir. MN leggur upp til at nevndin verður samansett soleiðis: -og at umsitingin kannar um hetta kann gerast við einari felags áheitan frá Tvøroyrar kommunu og Føroya Landstýrið-

- Tvøroyrar Kommuna



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Føroya Landstýrið
- Listasamtak Føroya
- Tónleikarafelag Føroya
- Eitt umboð sum uppá skift verður valt av Tvøroyrar kommunu og Føroya Landstýrið.

•

**Kommunustjórin 22.05.2020.**
Mælt verður til, at heita á nevndina í Saltsilogrunninum um at viðgerða og samtykkja uppskot frá Tvøroyrar kommunu um at broyta "vedtægter for Saltsilogrunnin", við víðkan av nevndini fyri Saltsilogrunnin frá 3 nevndarlimum til 5 nevndarlimir.

Uppskotið vísir til §12 Vedtææгtsændringer fyri Saltsilogrunnin: Vedtægtsændringer kræver, at bestyrelsen vedtager disse edstemmigt, og at ændringerne efterfølgende godkendes af Færøernes landstyre, Innlendismálaráðið.

**Verandi áseting av §5 Bestyrelsen:**

§5: "Fonden er en selvejende institution, som ledes af bestyrelsen, bestående af tre medlemer, der udpeges i henhold til denne vedtægt. Bestyrelsens medlemer udpeges i en periode af 4 år ad gangen og kan genudpeges.

Ved den første 4-årige periodes udløb, og for fremtiden, udpeges ny bestyrelse således: 1. Listasamtak Føroya udpeger et medlem 2. Tónleikarafelag Føroya udpeger et medlem 3. Førøernes landstyre, Mentamálaráðið, og derefter Tvøroyrar kommuna udpeger skiftevis et medlem

**Uppskot til broyting av §5 Bestyrelsen:**

§5: "Fonden er en selvejende institution, som ledes af bestyrelsen, bestående af fem (5) medlemer, der udpeges i henhold til denne vedtægt. Bestyrelsens medlemer udpeges i en periode af 4 år ad gangen og kan genudpeges.

Ved den første 4-årige periodes udløb, og for fremtiden, udpeges ny bestyrelse således: 1. Listasamtak Føroya udpeger et medlem 2. Tónleikarafelag Føroya udpeger et medlem 3. Færøernes landstyre, Mentamálaráðið udpeger et medlem 4. Tvøroyrar kommuna udpeger et medlem 5. Færøernes landstyre, Mentamálaráðið, og derefter Tvøroyrar kommuna udpeger skiftevis et medlem



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Anita Vibergsdóttir skjótir upp, at allir býráðslimir møta til fundin sum er avtalalaður 8. Juni 2020 við nevndina í Saltsilogrunninum. Uppskotið hjá Anitu Vibergsdóttir var einmælt samtykt.

**17.11.00-Ø40-1-20**

## 11. Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul 2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 13.05.2020**
Leiðarin á Føroya Eftirskúli hevur sent umsitingin umsókn um stuðul fyri ári 2020. Tvøroyrar kommununa hevur avsett á fíggjarætlanini fyri 2020. kr. 500.000,- sum stuðul til Føroya Eftirskúla. Og avtala er gjørd við Pól Arna Holm Skúlastjóra á Føroya Eftir Skúla, um at møta á fundi í Mentanarnevndini fyri at greiða frá gongdini í Eftirskúlanum.

Viðmerkjast skal, at Tvøroyrar býráð hevur 11. apríl 2019, samtykt at lata Eftirskúlanevndina gera brúk av hølunum í "postabygninginum", og at gjaldast skal ikki leiga fyri tað fyrsta árið. Hetta verður ein partur av íkastinum hjá Tvøroyrar kommunu. -Eisini verður upplýst á kunnandi forfundi hin 11. apríl 2019, av form. í nevndini fyri Føroya Eftirskúla, at "íløgurnar eru helvt um helvt millum landið og kommununa, har skúlin er staðsettur, samb. lóg um eftirskúlar"

**Kommunustjórin mælir til at:**
- Føroya Eftirskúli sendir Tvøroyrar kommunu umsókn um at loyvið til at leiga í "postbygninginum" í skúlaár 2020/2021.
- Leigusáttmáli verður gjørdur skjótast gjørligt, har leigugjaldið fyri Føroya Eftirskúla verður ásett til tað sama, sum er galdandi fyri Posta, sum leigar part av niðara hæddini í sama bygningi d.d. fyri kr. 875,-/m2/ár.
- Heitt verður á nevndina í Føroya Eftirskúla at venda seg til landsstýrismannin, -samb. Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar-, fyri at søkja um stuðul samb. løgtingslóg um eftirskúlar.
- Tvøroyrar kommuna veitur stuðul til Føroya Eftirskúla, eftir at landstýríð hevur veitt stuðul.

***Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar:***
*Kapittul 6*



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

*Fígging av rakstri og íløgum*
*§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. írestandi fígging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*
*Stk. 2. Landskassans partur er:*
*1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*
*2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*
*3. Til keyp av innbúgvi og undirvísingarambоðum eftir landsstýrismansins góðkenning verða latin í mesta lagi 50% av kostnaðinum í stuðli.*

**Mentanarnevndin, 18. maj 2020, pkt. 1:**
Pól Arna Holm Skúlastjóra á Føroya Eftir Skúla, møti á fundinum í Mentanarnevndini fyri at greiða frá gongdini í Eftirskúlanum. Pól Arni Holm greiddi frá, at d.d eru 10 umsóknir, og fleiri fyrispurningar til luttøku til skúlan. Filmur við Grønlendskum talu er framleiddur, sum lýsir skúlan og verður útgivin í dag. Pól Arni Holm, upplýsti eisini, at Mentamálaráðið er í ferð við at orða skriv til Grønlendska Heimastýrið við áheitan um at broyta eina Grønlendska kunngerð, soleiðis at Grønlendski stuðulin fylgir grønlendskum næmingunum, um teir velja at koma til Eftirskúla í Føroyum. Pól Arni Holm upplýsti at, tað er átrokandi at stuðulin frá Tvøroyrar kommunu verður útgoldin skjótast, sum er ætlaður til lýsingarátøk innbúgv o.a. fyri at kunna byrja.

Mentanarnevndin samtykir einmælt, at Tvøroyrar kommuna veitur stuðul á kr. 500.000,- til Føroya Eftirskúla, treyta av at grandskoðaður rokniskapur fyri ári 2019 er innlatin til Tvøroyrar kommuna.

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 12:**
Kristina Roest og Bogi Johannesen taka undir við tilmælinum frá mentanarnevndini, at Tvøroyrar Kommuna veitur stuðulin á kr. 500.000,- til Føroya Eftirskúla.
Kristin Michelsen tekur ikki undir við at veita stuðulin frá Tvøroyrar kommuna, fyrr enn Mentamálaráði fráboðar at Føroya Eftirskúli kann byrja.

**Avgerð**

Tvey uppskot vóru til atkvøðu.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Kristin Michelsen skjótir upp, at Tvøroyrar kommuna stuðlar við kr. 500.000,-, men at stuðulin ikki verður fluttur Føroya Eftir Skúla fyrr enn vissa er fyri at skúlin verður veruleiki.
Fyri var: Kristin Michelsen og Alvi Mortensen
Ímóti: Pauli Einarsson, Súsanna Bertholdsen, Annika Pearce, Kristina Roest
Blankt atkøddi: Anita Vibergsdóttir
Uppskoti er ikki samtykt

Atkvøtt var um tilmælið frá Fíggjarnevndini um at Tvøroyrar kommuna stuðla Føroya Eftirskúla við kr. 500.000,- og at stuðulin verður veittur beinanvegin.
Fyri var: Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Pauli Einarsson, Annika Pearce.
Blant atkvødd: Kristin Michelsen og Alvi Mortensen
Uppskotið er samtykt

**00.17.00-A00-1-20**

## 12. RFF -Fundarfrøsøgn frá aðalfundinum 30. apríl 2020

### Avgerð

Málið var kunna og umrøtt

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 26.05.2020**
Frásøgn frá aðalfundinum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum varð hildin talgilt tann 30. apríl 2020.

**00.17.00-G00-1-20**

## 13. SEV -Fundarfrágreiðingin frá ársaðalfundinum 24. apríl 2020

### Avgerð

Málið var kunna og umrøtt

### Málsfrágreiðing



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 26.05.2020**
Fundarfrágreiðingin frá ársaðalfundinum hjá SEV 24. apríl 2020



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
| --- | --- |
| Fundardagur | 27. maj 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin 19:55**

Kristin Michelsen

Annika Paerce

Anita Vibergsdóttir

Pauli Einarsson

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Susanna Bertholdsen



Formansváttan